# Manhattan og Cippo við nýggjum profili

**Manhattan skal vera Føroya størsta øl pubb við livandi góðsku tónleiki fimm kvøld um vikuna, og Cippo skal í nógv størri mun bjóða livandi tónleik og hvørt leygarkvøld nøkta tørvin hjá teimum 23-27 ára gomlu. Hetta eru ætlanirnar hjá nýggju eigarunum av barrini og dansistaðnum**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*


*All That Rain leggur fyri, tá Cippo bjóðar teimum 23-27 ára gomlu livandi tónleik*

Herfyri keyptu menninir aftan fyri raksturin av Cippo, bæði Cippo og barrina Manhattan frá Mouldi Manai, ið sostatt fór burturúr náttarlívinum í Havn, ið hann hevur verið við til at myndað tey seinastu sekstan árini. Tað lá longu í kortunum, tá sølan var framd, at nýggju eigaranir Rúni Djurhuus og Háldan Haldansen høvdu ætlanir um broytingar. Hetta hóast teir ikki høvdu nakrar viðmerkingar tá. Men hetta vikuskiftið lata Cippo og Manhattan upp við nýggjum profili og stórum ætlanum. Cippo skal bjóða livandi góðsku tónleik, og góðar plátuvendarar, meðan Manhattan skal gerast størsta øl pubbin í Føroyum.

### Cippo við livandi tónleik

Leygarkvøld á Cippo verður nú ætlað teimum 23-27 ára gomlu, greiður Rúni Djurhuus frá. Hann sigur, at hesin bólkur í løtuni ikki veruliga hevur nakað stað at fara. Tí fer Cippo at bjóða teimum innar hvørt leygarkvøld. Her er ikki talan um eitt veruligt aldursmark, ið bert umfatar hendan bólk, men heldur at tónleikaprofilurin verður lagdur til rættis at passa til hendan bólk. Ein partur av hesum verður gjørt við, at livandi tónleikur við nøkrum av Føroya bestu bólkum verður annað hvørt leygarkvøld, harumframt spæla DJ'arnir eisini tónleik til henda málbólk. Leygarkvøldið er tað All That Rain, ið leggur fyri.

### Spælistað í Tórsgøtu

Fríggjakvøld verður ókeypis atgongd á Cippo, ætlanin er, at minnið royndir bólkar og bólkar, ið vanliga ikki hava møguleika at spæla á dansistøðum sleppa at framføra tá. Her verður altso talan um eitt slag av livepalli ella spælistaðið um tú vilt, greiður Rúni Djurhuus frá. Hetta verður ivaleyst ikki hvørt fríggjakvøld, men skiftir eitt sindur við DJ'ar. Profilurin fríggjakvøld verður eitt sindur yngri enn leygarkvøld.

### Spurnar- og poolkapping

Upplatingartíðirnar á Cippo verða broyttar eitt sindur. Cippo letur upp kl. 17 mánadag til fríggjadag, leygardag og sunnudag er opið frá kl. 14.00. Eisini mitt í viku verða tiltøk, týskvøld verður Quiz Master spurnarkapping við vertinum James Olsen. Rúni Djurhuus greiðir frá, at ætlanin er, at brúka hølini og tað útgerð í er í teimum, soleiðis at t.d. ljóðspurningar og annað verða partur av spurnarkappingunum.

Hvørt hóskvøld verður poolkapping við sera góðum vinningum, eitt nú uttanlandsferðum og tílíkum.

### Nógvur livandi tónleikur

Eisini Manhattan hevur broyttar upplatingartíðir. Nú verður opið øll kvøld uttan mánakvøld. Mikukvøld til sunnukvøld verður livandi tónleikur, her verður talan um góðsku tónleik, sigur Rúni Djurhuus. "Vit fara at hava stór føroysk nøvn og útlendskar trubadurar, eitt nú er avtala gjørd við tiltikna trubadurin Doc, um at koma at spæla.", greiður Rúni frá. Hetta vikuskiftið eru tað Finnur Jensen og Høgni Reistrup, ið fara á pallin fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Hetta er síðsta konsertin hjá teimum báðum, áðrenn teir fara til Danmarkar, har teir búgva. Í kvøld hóskvøldið er tað Jákup Dam spælir, ið spælir.

### Fyrireika seg til HM

HM í fótbólti stendur fyri durum. Manhattan og Cippo hava fyrireikað seg til hetta, og ætla at vísa tveir í senn undir HM, ein dyst í Manhattan og ein í Cippo. Cippo hevur frammanundan tvær stórar videokanónir, og nú eru tríggir stórir plasma skíggjar settir upp í Manhattan, sigur Rúni Djurhuus.

# Dating.fo eitt stað har stakir føroyingar hittast

**Á dating.fo sleppa stakir føroyingar at leggja sína vangamynd og annað í royndini at hitta aðrar stakar føroyingar. Hóast tíðarætlanin, fyri nær dating.fo letur upp, er ógreið, og at tað neyvan verður við bræði, so er maðurin, ið eigur vevbústaðin, vísur í, at føroyingar eru búnir til ein tílíkan portal**

KT-SAMBOND
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Heimasíðuheitið dating.fo er skrásett, og sambært manninum, ið eigur heitið Hanus Kjærbo, so er ætlanin at gera ein portal, har føroyingar kunnu hittast, kjatta og kanska eisini gera avtalu um at hittast í veruleikanum.

### Kollvelt sambond

Alnetið hevur kollvelt samveruna millum menniskju um allan heim, alt fleiri fólk koma í samband við hvør annan umvegis telduna. Longu í barnaárunum hjá alnetinum, vóru tað kjak síðurnar, ið vóru tær best umtóktu, og nógv pør kring allan heim hava funnið hvørt annað umvegis alnetið. Eitt nú var Faroese Chat eitt satt gullnám fyri alnetskærleika fyri nøkrum árum síðan. Nú er danska heimasíðan Arto.dk sera væl umtókt millum yngru føroyingarnar.

Í Danmark hevur heimasíðan dating.dk síðan 1998 voksið seg risa stóra, og telist nú millum mest vanligu mátarnar hjá støkum dønum at koma í samband við hvør annan.

### Marknaðurin er búgvin

Men ber tað til, at fáa stakar føroyingar at leggja sína vangamynd á ein portal, ið bert hevur til endamáls at hitta aðrar stakar føroyingar?

Hanus Kjærbo heldur, at tað ber til. Hann vísir á, at føroyingar á kjaksíðum sum faroese chat longur fyri fleiri árum síðan, byrjaðu at skapa sambond umvegis alnetið. Tá komu beinanvegin fleiri heimasíður, har yngru kjattararnir løgdu sínar vangamyndir, so hetta er ikki eitt ókent fyribrigdi á okkara leiðum. Hanus sigur, at hann metur, tað vera júst tey yngru, ið fara at nýta síðuna dating.fo.

### Ikki við bræði

Hanus greiður frá, at sjálvt um hann trýr, at marknaðurin er búgvin, so verður tað ivaleyst ikki við bræði, at dating.fo letur upp. Hann er í løtuni í ferð við aðrar verkætlanir, ið skulu avgreiðast áðrenn farið verður undir henda portal. "Føroyski marknaðurin er jú ein rættiliga lítil marknaður, tí havi eg valt ikki at prioritera júst hetta hægst.", sigur hann.

### Rekur danskar portalar

Hanus Kjærbo er búsitandi í Danmark, har hann júst er liðugur við útbúgvingina sum datamatikari. Hann rekur sítt egna virkið, ið umsitur portalarnar dkjobs.dk, freelance.dk, studiejobs.dk, salgsjob.dk. Hann hevur sostatt nógvar royndir við arbeiðunum við portalum.

